Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Høgni Hoydal, løgtingsmaður

Svarari: Jacob Vestergaard, landsstýrismaður

Evni: Nýtt tilfeingi, kvotur og gjøld í fiskivinnuni

Spurningar:

1. Við teimum kvotum og tí nýggja makreltilfeingi, sum Føroyar hava ásett í 2021, hvussu nógv hevði verið boðið út á uppboðssølu, um lógin hjá undanfarnu samgongu enn var í gildi (sjófeingislógin sum var galdandi í 2018 og 2019)?

2. Hvussu nógv hevði verið boðið út í tonsum í 2021 av ávikavist:

   - Makreli
   - Norðhavssild
   - Svartkjafti
   - Botnfiski í Barentshavinum og við Svalbard?

3. Hvussu stór hevði inntøkan verið hjá landskassanum av hesum uppboðum, umframt veiðigjøld, um miðalprísirnir vóru teir somu fyri fiskasløgini sum í 2018 og 2019?

4. Hvussu stórur er munurin í mun til tað, sum nú verður mett í inntøku til landskassan av veiðigjøldum í 2021?

5. Hvussu stórar høvdu menningarkvoturnar verið í tonsum í 2021 av makreli, norðhavssild og svartkjafti, um sjófeingislógin hjá undanfarnu samgongu enn var í gildi?

Viðmerkingar:
Føroyar hava hækkað sína makrelkvotu við áleið 60.000 tonsum. Hartil er sildakvotan hækkað og kvotan av botnfiski í Barentshavinum orsakað av tilmælum og samráðingum.

Sjófeingislógin hjá undanfarnu samgongu hevði greiðar ásetingar um, at hækkaðar kvotur og nýtt tilfeingi skuldu bjóðast út. Hartil hvussu nógv skuldi vera í menningarkvotum.

Tí verður spurt, hvussu nógv hevði verið boðið út, og hvussu nógv hevði verið í menningarkvotum, um lógin hjá undanfarnu samgongu enn var í gildi.

Hartil verður spurt, hvussu inntøkan hevði verið hjá landskassanum við somu miðalprísum sum í 2018 og 2019 – og hvør munurin er í mun til mettu inntøkurnar nú.

Á Løgtingi, 3. august 2021

Høgni Hoydal
løgtingsmaður